# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05**

Í sendingini er m.a. prát við Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil, við Petur Martin Johansen og Høgna Mikkelsen frá Billutum og Lars S. From, stjóra í Mekonomen. Eisini er prát við danska motorjournalistin og amatørsjónleikaran Terkel Spangsbo.

2 RÁS ...títt radio




*Høgni Mikkelsen og Petur Martin Johansen framman fyri nýggja handilin við Hoyvíksvegin*

# Billutir við nýggjum handli

Eyklutafyritøkan Billutir letur í dag upp í nýggjum og størri hølum við Hoyvíksvegin 61 í Havn. Billutir heldur til á tilsamans 500 fermetrum við handli í niðaru hædd og eyklutagoymslu á aðru hædd.

Stjórin í Billutir, Petur Martin Johansen, sigur, at nýggi handilin er gjørdur í samstarvi við Mekonomen, sum er største heilsølufyritøkan í Norðurlondum innan eykalutir, útgerð og amboð til bilar. Mekonomen er upprunaliga ein svensk fyritøka og hevur í løtuni 206 deildir í Svøríki, Norra og Danmark.

Billutir bleiv stovnað í Kollafirði í 1993. Í 2004 flutti fyritøkan til Havnar og hevur hildið til í Bókbindaragøtu. Fyritøkan hevur spesilaiserað seg í eykalutum til bilar, so sum plátulutir, útstoyt, lyktir og annars allar slitlutir - bæði brúktar og nýggjar.

Í dag eru tað Petur Martin Johansen og Høgni Mikkelsen, fyrrverandi byggimeistari, sum eiga Billutir, ið hevur fimm fólk í starvi.

**mg**



*Lars S. From er stjóri í Mekonomen í Danmark*

## Bilur til sølu



**Okkum er sent**

Hendan lýsingin hevur staðið í eini íslendskari avís:

Bláur Volkswagen Golf frá 1985 til sølu. Bilurin hevur bert koyrt 65 km og einans í fyrsta og bakkgeari. Hann hevur ongantíð koyrt skjótt. Dekkini eru original. Tað sama er galdandi fyri bremsur og bensin. Bert ein eigari.

Vit hava hoyrt eina søgu um, at einaferð vann vitapassarin í Mykineshólmi ein bil við einum lutaseðli. Um tann bilurin kom út í hólman, sigur søgan einki um.